# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Verið varin

Betri fyrivarin enn eftirsnarin. Hetta orðafellið man hóska sera væl til hesa tíðina á árinum, tá fýrverk verður skotið og bál kynd kring landið alt. Tá ræður um meira enn nakrantíð at vera ansin, tí skjótt kann standast stórur skaði av fýrverki. Og bera vit okkum rætt at og fylgja fyriskriftunum, so er vandin ikki so stórur, tó at vandi altíð kann standast av fýrverki.

Hvussu oftani hoyra vit ikki tey sorgartíðindi eftir hvørt nýggjár, at fólk hava oyðilagt sjón ella hoyrn og aðrar likamslutir vegna ósketmi nýggjársaftan. Ja fólk hava entá latið lív, tá vit annars skuldu bjóða nýggja árinum vælkomnum. Ein gleðistíð verður tá bráddliga til eina sorgartíð.

Hetta hendir eisini her heima hjá okkum. Og oftani standast hesir skaðar av, at tey, sum seta eld á rakettir, bumbur og annað fýrverk ikki eru nóg ansin.

Sjálvandi skulu vit øll ansa eftir. Her hava foreldur og avvarandi eina stóra ábyrgd. Børn skulu fáa boð um at brúka verdnarbrillur, tá tey seta eld á fýrverk. Og her hevur uppdragilsi eisini nógv at siga. Tað er ikki nokk, at børn og ung fáa at vita, hvussu tey skulu bera seg at. Tey vaksnu, sum eisini skjóta fýrverk, mugu vera góðar fyrimyndir og sjálvi bera seg rætt at. Tíverri gera tey ikki altíð tað, og har rúsdrekka er uppií, er orsøk til at vísa eyka varsemi.

Eisini mongu bálini, ið verða kynd nýggjársaftan, kunnu vera vandamikil, um ikki verður ansað væl eftir. Fyrr vóru als ongar reglur fyri bálum og brunnu tey oftani millum hús og setti eld á. Nú eru gjørdar neyvan leiðbeiningar fyri eitt nú at brenna bál, sum væl varð greitt frá í grein her í blaðnum í gjár.

Latið okkum øll somul hava trygdina í huganum nýggjársaftan. Og latið okkum eisini ansa eftir hvørjum øðrum, leiðbeina og vegleiða og stuðla, har hetta er neyðugt. Sjálvandi ræður hvør sær og sínum. Men slíkt kvøld, tá alt er á gosi, øll eru í ovfarakæti, tá eru løtur, har skilið ikki altíð fylgir gleðisróminum. Og tá eiga vit øll at vera um hvør annan. Eitt mist eygað á nýggjárinum er eitt ov nógv.

**Sosialurin**

## Søguligur sigur til Obama

**FRANK DAVIDSEN**
Sørvágur



Og helst størsti ósigur hjá teimum konservativu í amerikanska søguni.

Eitt er, at amerikanski veljarin gav Obama tann meiriluta, ið var neyðugur, eitt heilt annað er at fáa ta umfatandi heilsutrygdina á skránna og ikki minst samtykta. Eina heilsutrygd, har samhaldsfesti var avgerðandi í hesum fíggjarliga kanska mest framkomna samfelagi í heiminum, men har samhaldsfesti higartil hevur verið eitt banniorð. So tað var ikki eiti á jólagáva, tey minni mentu fingu, eftir at tey vóru sloppin upp á fjall, tí, sum fyrr nevnt, so var samhaldsfesti í tí ovurríka Amerika ein býur í Kina.

So kann ein spyrja seg sjálvan, hvussu tað kundi bera til, at bert ein partur av fólkinum frammanundan høvdu heilsutrygd í einum av heimsins ríkastu londum, meðan 30-40 milliónir fólk als onga heilsutrygd høvdu. Taka vit árið 2009 so mistu 16 % sína heilsutrygd afturat teimun 30-40 milliónum ótryggjaðu amerikanarunum, einfalt tí tey mistu sítt arbeiði, samstundis sum gjaldið til teirra heilsutrygd var so høgt, at tey vóru noydd at velja ímillum at missa hana ella sita svong.

Hjá tryggingarfeløgunum og privathospitalunum ræður tað fyrst og fremst um ikki bert at tjena pening, men so sanniliga eisini um, at íleggjarnir til hesar stovnar fáa eitt so stórt avlop við ársenda sum gjørligt. Tí hava nevndu feløg eina stóra fjøld av advokatum, sum royna allar snildir, so at tey, sum hava goldið eitt risagjald at tryggja seg, fáa minst møguligt burturúr, um tey gerast sjúk, og teimum tørvar hjálp. Ja í summum førum eru fólk tveitt út av privathospitalinum aftur, um minsti ivi er um teirra diagnosu.

Kann ikki lata vera við at greiða frá, hvat ein langfarasjómaður greiddi mær frá, tá hann var í regluligari sigling millum Bolivia, eitt fátækastu londum í heiminum, og Miami í Amerika.

Tað bar so á, at undir lossing í Miami var ein av lossingarmonnunum fyri óhappi og fekk stóran skaða og bløddi illa av løstinum, hann hevði fingið. Sjúkrahúsið sást týðuliga, haðani óhappið hendi, og skjótt var ein sjúkrabilur á staðnum. Men meðan stýrimaðurin royndi at steðga álvarsligu bløðingini, vóru ambulansafólkini meira áhugað í at fáa eina váttan fyri, um skaddi maðurin var tryggjaður ella ikki. Og tað kom ikki uppá tal at hjálpa sjúklinginum ella flyta hann inn í sjúkrabilin tíansheldur á sjúkrahúsið, fyrrenn tey høvdu eina undirskrift frá arbeiðsleiðaranum. Hetta alt meðan sjúklingurin var um at bløða út. Soleiðis gekk út ímóti ein hálvur tími, til arbeiðsformaðurin, ið hevði verið eitt ørindi, kundi váttað, at skaddi maðurin var tryggjaður, og tástani var sjúklingurin í sjúkrabilinum fluttur á sjúkrahúsið, og var tað í evstu løtu.

Tað var lagnunar speisemi, at ein lossingamaður av eini ella aðrari orsøk varð skotin á kajini, tá skipið var aftur í Bolivia og lá og lastaði bananir og aðra frukt, sum skuldi til Miami. Styrimaðurin, sum var føroyngurin, ið segði mær søguna, fór í skundi upp á brúnna eftir sjúkrataskuni, men tá hann var komin niður aftur á kajina, vóru menn longu í holtur við at flyta skotna mannin upp í ein sjúkrabil, ið stundisliga var á staðnum, og frættu teir aftaná, at orsaka av skjóta atburðinum lat maðurin ikki lív.

Hesar hendingar vísa okkum heilt greitt, hvat virði eitt mannalív hevur ávíkavist í heimsins mest framkomna og ríkasta landið og í einum tí fátækasta landinum í heiminum.

## Flogferðslan í Grønlandi órógvað

Air Greenland noyddist bæði mánadagin og týsdagin at avlýsa alla flúgving úr Grønlandi til Danmarkar, tí tað var so nógvur vindur á vesturstrondini í Grønlandi. Nógv innanlensis fugving var somuleiðis avlýst. Avlýsingarnar hava havt við sær, at yvir 800 ferðafólk ikki eru sloppin á flog, og nógvur flogpostur til Grønlands frqamvegis liggur og bíðar í Danmark.

## Brasil fær CO2-lóg

Hóast einki veruligt úrslit spurdist burtur úr altjóða veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn, hevur Brasil gjørt av at halda lyftið, sum landið gav um at skerja sítt CO2-útlát. Tí hevur Lula da Silva, forseti, skrivað undir og staðfest eina nýggja lóg, sum skal skerja landsins CO2-útlát 39 prosent hetta til 2020. Lógin fær kortini ikki bara rós. Tvørturímóti halda fleiri, at hon er ov ógreið, og at hon sigur ikki nóg neyvt, hvussu nógv útlátið skal skerjast í eitt nú ídnaðinum, orkuvinnuni ella landbúnaðinum. Greenpeace í Brasil sigur lógina vera eina røð av góðum ætlanum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.